# Línubátar rokast á Føroya Banka

**Línubáturin, Sigmundur, landaði í gjár 150.000 pund á 8 setum. – Skipini hava fingið heilt uppí 25.000 pund á setuna, sigur Høgni Hansen á Fiskamarknaði Føroya**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Toskurin av Føroya Banka hevur havt góðan prís á Fiskamarknaði Føroya í vetur.*

Seinastu tíðina hava línubátar, sum hava roynt á Føroya Banka, fingið nógvan og góðan fisk. Vánaliga veðrið hevur tarnað fiskiskapinum, men væl er komið burtur úr kortini. Prísurin fyri fiskin av Bankanum hevur verið góður, serliga fyri toskin, sum er bæði stórur og góður. Hýsan er eisini góð, men er heldur smærri í vetur enn seinasta vetur. Prísurin á hýsuni hevur verið meira skiftandi, tó sum heild hampiligur í seinastuni.

### Stórar setur

Á Fiskamarknaði Føroya, sigur Høgni Hansen, at línubátar hava fingið heilt uppí 25.000 pund á setuna á Føroya Banka.

Hósdagin landaði Fiskamarknaðurin á Toftum tríggjar línubátar, harav tann eini hevur roynt á Bankanum; tað er Sigmundur, sum hevði 150.000 pund á 8 setum. Jógvan Norði hevur roynt eystanfyri og hevði 60.000 pund, meðan Váðasteinur, sum hevur roynt vestanfyri, hevði 100.000 pund.

Fyrr í vikuni hava línuskipini, Pison, Venus og Hoyvíkingur, sum eisini hava verið á Bankanum, selt um Fiskamarknaðin.

### Góður prísur

Høgni Hansen sigur, at eini 60% av toskinum, sum línuskipini hava fingið á Føroya Banka, er toskur 1, og her hevur prísurin ligið uppí 31-32 kr. fyri kg. Toskur 2 hevur ligið um 29-30 kr. fyri kg.

– Hinvegin hevur prísurin á hýsuni, sum kanska hevur verið tann størri parturin av veiðini, verið meira skiftandi, vísir hann á.

Hetta er góð fiskitíð á Bankanum og sum skilst, hava nøkur línuskip gjørt einar 2-3 túrar har úti í vetur.

Kønir siga, at toskurin á Føroya Banka, sum er ein stovnur fyri seg, gýtir heldur seinni enn toskurin á landgrunninum annars.

### Eingin útróður

Á Fiskamarknaði Føroya hevur ikki so nógv verið at gjørt í seinastuni, tí líkindini til útróður hava verið so vánalig.

– Lítil og eingin útróðrarfiskur er komin uppá land í seinastuni, og tí er heldur ikki so nógv rokan her beint nú, sigur Høgni.

Í fyrru helvt av januar var hópur av útróðrarfiski á gólvinum hjá Fiskamarknaði Føroya, bæði á Toftum og í Klaksvík.

Høgni Hansen sigur, at fiskurin, sum skipini fáa úti á, er nógv betri fyri enn fiskurin, sum útróðrarbátarnir fáa nærri landi.

– Fiskurin, sum kemur av Føroya Banka, er góður, leggur hann aftrat.

# Tríggir trolarar hava landað á Sandi

**Nú so nógvur upsi kemur uppá land, verður eisini nógvur upsi saltaður á virkinum á Sandi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Á báðum fiskavirkjunum hjá Sandoy Seafood í Sandoynni hava tey havt úr at gera, bæði í síðstu viku og hesa vikuna, sum nú er at enda. Annars hevur nógv fiskaarbeiði verið á báðum virkjunum, síðan gongd kom á aftur eftir, at verkfallið í fiskiskipaflotanum var av.

### Tríggir trolarar

Í síðstu viku landaðu tríggir trolarar á Sandi, Eysturbúgvin, Skansatangi og Research, og hesa vikuna hava aftur tríggir trolarar lagt veiðina upp á Sandi.

Týsdagin landaði Eysturbúgvin 160.000 pund, og í gjár landaðu Nornagestur og Kolumbus eini 200.000 pund. Meginparturin av veiðini hjá øllum trimum skipunum var upsi.

Aftrat ráfiskinum, sum komin er um bryggjukantin, hevur Sandoy Seafood eisini keypt nakað av fiski á Fiskamarknaðinum, bæði í síðstu viku og í vikuni sum fer.

### Eingin yvirtíð

Á Sandoy Seafood, sigur Jóan Petur Vest, at hóast stóru ráfiskanøgdirnar, megna arbeiðsfólkini á Sandi og í Skopun at arbeiða fiskin undan – uttan, at neyðugt er at arbeiða yvir.

Á Sandi verður tann stóri fiskurin flaktur og saltaður, meðan tann smærri fiskurin verður skorin til flak og frystur í Skopun.

– Nú so nógvur upsi kemur uppá land, verður eisini nógvur upsi saltaður. Sum skilst á Jóan Peturi, salta tey á Sandi eisini nakað av brosmu og longu, tá ið hesi fiskasløgini eru uppi í veiðini hjá skipunum.

Útróður hevur eingin verið í seinastuni, tí tað hevur viðrað so illa.



*Bæði á Sandi og í Skopun hava tey úr at gera. Ikki færri enn seks trolarar hava landað á Sandi seinastu tvær vikurnar.*



UTTAN ÚR HEIMI

# Nýggj krøv úr Norðurkorea



*So tættir standa hermenninir á markinum millum Norður- og Suðurkorea. Her eygleiðir ein norðurkoreanskur hermaður ein suðurkoreanskan hermann hinumegin markið.*

**Norðurkoreanska stjórnin krevur nú, at USA skal taka síni kjarnorkuvápn úr Suðurkorea.**

NORÐURKOREA-USA
*Árni Joensen:*

Norðurkorea ger nú greitt, at landið ætlar sær ikki at tosa við suðurkoreanar ella japanar um kreppuna við kjarnorkuverkætlanini, men at landið einans vil tosa við USA um málið. Tí noyddist ein suðurkoreanskur sendimaður so nakkalangur heimaftur, tá hann í vikuni kom til Pyongyang at royna at finna eina loysn á kreppuni. Við sær fekk hann eitt bræv frá norðurkoreansku stjórnini - ikki til stjórnina í Seoul, men til amerikansku stjórnina.

Samstundis er Norðurkorea farið at seta USA nýggj krøv. Í gjár boðaði stjórnin frá, at hon vil hava USA at taka øll síni kjarnorkuvápn úr Suðurkorea. Norðurkoreanska stjórnin sigur, at amerikanarar hava gjørt Suðurkorea til eina av teimum størstu vápnagoymslunum í Fjareystri, og at har eru meiri enn 1.000 amerikanskar kjarnorkuløðingar.

Samstundis eru fleiri tekin um, at viðurskiftini millum Norðurkorea og grannalondini versna. Í hesum føri er ikki bert talan um Suðurkorea, men eisini um Kina og Japan. Serliga í Japan hevur kreppan við Norðurkorea vakt ans, og tað hevur ikki bøtt um støðuna, at japansku myndugleikarnir siga seg hava avdúkað eitt norðurkoreanskt njósnarakervi.

Norðurkoreanar eru eisini misnøgdir við, at Kina hevur latið fólk, sum eru flýdd úr Norðurkorea, sleppa til Japan, har tey síðani hava fingið friðskjól.

# Evropeiskir leiðarar stuðla Bush

**Átta evropeiskir stjórnarleiðarar hava skrivað bræv, har teir styðja amerikanska forsetan og ætlan hansara at leypa á Irak. Samstundis vísir ein kanning, at nógv teir flestu evropeararnir eru ímóti álopi uttan so, at ST samtykkir tað.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Tað var spanski forsætisráðharrin, Jose Maria Aznar, sum tók stig til stuðulsbrævið, sum stóð á prenti í bretska blaðnum The Times og fleiri øðrum evropeiskum bløðum í gjár.

Umframt spanska forsætisráðharran hava forsætisráðharrin í Italia, Silvio Berlusconi, forsætisráðharrin í Danmark, Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharrin í Portugal, Jose Manuel Barroso, foræstisráðharrin í Ungarn, Peter Medgyessy, forsætisráðharrin í Pólandi, Leszek Miller og forsetin í Kekkia, Vaclav Havel, skrivað undir brævið.

Harafturímóti vóru ongar undirskriftir hjá teimum báðum atfinninarsomu leiðarunum í Fraklandi og Týsklandi á brævinum. Gerhard Schrøder og Jacques Chirac hava gjørt Bush greitt, at teir taka ikki undir við Irak-politikki hansara og hóttanini um kríggj.

Teir átta leiðararnir skriva, at hópoyðingarvápnini hjá Saddam Hussein eru ein hóttan ímóti heimsfriðinum, og at tað er neyðugt at standa saman um kravið um, at Irak skal beina fyri hesum vápnunum. Teir leggja afturat, at samhaldsfesti og samanhald og ein avgjørd støðutakan er tað, sum best kann tryggja, at málið verður loyst á ein friðarligan hátt.

Teir átta vísa eisini á, at ES tekur undir við teirri seinastu ST-samtyktini um Irak, og teir leggja afturat, verður samtyktin ikki fylgd, er vandi fyri, at trygdarráðið hjá ST missir sítt trúvirði, og tað kann koma heimsfriðinum illa við, siga teir. Teir siga seg tí ikki ivast í, at trygdarráðið fer at fylgja sínari ábyrgd.

### Fólkið ímóti

Samstundis sum teir átta evropeisku leiðararnir kunngjørdu stuðulin til Bush, almannakunngjørdi ES-nevndin eina meiningakanning, sum vísti, at 82 prosent fólkinum í Evropa eru ímóti amerikansku ætlanini at leypa á Irak uttan so, at ST samtykkir tað.

Kanningin avdúkar eisini, at heili 72 prosent av veljarunum í Evropa halda, at stríðið millum USA og Irak í veruleikanum snýr seg um iraksku oljuna, sum amerikanarar vilja hava ræðið á. 41 prosent av teimum spurdu siga, at amerikanski uttanríkispolitikkurin er rættur, meðan 54 prosent halda hann vera skeivan.

15.080 fólk í 28 londum tóku lut í kanningini, sum varð gjørd í døgunum frá 21. til 27. januar.

## Aftur til arbeiðis

Líkt er til verkfalshugurin í Venesuela er farin at linka. Í hvussu er hava fleiri handlar latið uppaftur teir seinastu dagarnar, og á øðrum arbeiðsplássum eru fólk so smátt farin aftur til arbeiðis.

Ein orsøk til hetta er, at myndugleikarnir við Hugo Chavez, forseta á odda hava gjørt av at koyra fólk úr arbeiði, vilja tey ikki koma aftur til arbeiðis. Mikudagin fingu 5.111 fólk hjá almenna oljufelagnum at vita, at tey skuldu ikki koma aftur til arbeiðis har. Tað gjørdi, at onnur starvsfólk hjá felagnum fóru at kenna seg ótrygg, og fleiri teirra valdu at fara aftur til arbeiðis, siga tíðindini úr høvuðsstaðnum Caracas.

Oljuframleiðslan í Venesuela hevur ligið at kalla still, síðani verkfallið byrjaði fyri tveimum mánaðum síðani, men nú er framleiðslan so smátt farin aftur í gongd. Leiðslan í fakfelagnum, sum hevur skipað fyri verkfallinum, sigur, at hon fer at halda fram við tiltøkum sínum, men nógv bendir nú á, at tað er til fánýtis. Chavez hevur gjørt greitt, at hann slakar ikki ein tumma fyri fakfeløgunum, sum hava kravt hann frá ella nývál.

## Spreinging í USA

Myndugleikarnir í amerikanska statinum North Carolina hildu í gjár, at átta fólk høvdu latið lív í einari sterkari spreinging á einari kemiskari verksmiðju í býnum Kinston.

Tíðindini um vanlukkuna vóru rættiliga ógreið, men hildið varð, at tey átta arbeiddu á verksmiðjuni. Løgreglan visti ikki, hví vanlukkan var hend, men sagt varð, at spreingingin var so sterk, at ein stórur partur av takinum á verksmiðjuni varð blástur omanav. Eldur kom í fleiri trø nærhendis verksmiðjuni, og roykurin var nógvur.

Sambært løgregluni í Kinston vóru umleið 255 fólk til arbeiðis á verksmiðjuni, tá vanlukkan hendi.

## A.P. Møller funnið olju

Danska felagið A.P. Møller og tess samstarvsfelagar hava funnið eina nýggja olju- og gasskeldu í Algeria. Leiðin er tætt við eitt økið, haðani nógv olja longu kemur.

Amerikanska felagið Andarco, sum er operatørur á leiðini, dugir ikki rættiliga at siga, hvussu stór tann nýggja oljukeldan er, men sagt verður, at eftir fyribilsmetingum kann leiðin geva einar 4.000 tunnur av olju um dagin umframt munandi nøgdir av gassi.

Almenna algeriska oljufelagið Sonotrach sigur 51 prosent í loyvinum, sum A.P. Møller er partur av. Danski parturin er 12,25 prosent. Hini feløgini, sum eru uppi í samtakinum, eru tað italska ENI/Lasmo og tað amerikanska Andarco Petroleum Corporation.

## Heimsins ríkasti tannáringur

Tá Athina Roussel mikudagin fylti 18 ár, gjørdist hon heimsins ríkasti tannáringur. Hendan dagin arvaði hon ikki minni enn góðar 21 mia. krónur.

Athina Roussel er abbadóttir tann kenda grikska stórreiðaran Aristoteles Onassis. Móður hennara, Christina Onassis, beindi fyri sær í 1988, tá Athina var trý ára gomul. Faðir Athine, frans-maðurin Thierry Roussel, hevur fleiri ferðir roynt at fáa ræðið á tí ovurstóra arvinum, men hóast hann tvær reisur hevur verið í rættinum við kravinum, hevur hann ikki fingið viðhald.

Tískil arvaði Athina 21 milliardir krónur mikudagin umframt oynna Skorpios í grikska havinum. Og meiri er eftir. Tá hon um trý ár fyllir 21, arvar hon minst 15 milliardir krónur afturat, og tá fær hon eisini ræðið á teimum ymsu grunnunum, sum abbin stovnaði.